UTTAN ÚR HEIMI

## Aftur vónir um frið

Í Norðurírlandi hava fólk aftur fingið vónir um frið, eftir at tann víðgongdi protestantiski felagskapurin Ulster Defence Association er gingin við til at steðga sínum virksemi, samstundis sum felagsskapurin hevur boðað frá, at hann væntandi fer at lata vápnini frá sær.

UDA hevur verið mettur sum tann mest víðgongdi felagsskapurin á tí protestantiska vonginum, og myndugleikarnir halda, at felagsskapurin hevur beint fyri minst 400 mótstøðufólkum. Tey seinastu árini hevur UDA ikki bara fingist við harðskap, men hevur eisini verið uppi í handli við rúsevnum, og tí ivast nógvir norðurírar í, at álvari er í tilboðnum frá UDA um at binda frið. Katólski flokkurin SDLP hevur eisini gjørt greitt, at hann tekur ikki orðini í álvara, fyrr enn UDA hevur víst í verki, at hann meinar tað, hann sigur, skrivar Reuter úr Belfast.

Ulster Defence Assoctation hevur gjørt greitt, at felagsskapurin fer ikki at lata vápnini frá sær, fyrr enn IRA ger tað sama. Leiðslan í IRA hevur fleiri ferðir sagt seg vera sinnaða at taka tað stigið, men enn er einki hent.

## 150 mió. ímóti AIDS

AIDS-grunnurin, sum fyrrverandi amerikanski forsetin Bill Clinton stovnaði fyri trimum árum síðani, fekk eina stórfingna gávu mánadagin.

Tá var norski forsætisráðharrin, Kjell Magne Bondevik, og vitjaði Clinton í New York, og við sær hevði hann eina tilsøgn frá norsku stjórnini um 150 milliónir krónur í stuðuli tey næstu fimm árini. Sambært tilsøgnini skulu pengarnir fyrst og fremst brúkast til bardagan ímóti AIDS í afrikonsku londunum Tansania og Mosambik, men ein partur skal eisini brúkast í Russlandi, skrivar Aftenposten.

Í New York greiddi Bill Clinton norskum fjølmiðlum frá, at AIDS er ein tann størsti trupulleikin í heiminum í dag. Umleið seks milliónir fólk eru smittað, og nógv fólk doyggja, sjálvt um tað ber til at fyribyrgja sjúkuni, segði hann. Kjell Magne Bondevik segði seg vera hugtiknan av arbeiðinum, sum grunnurin hjá fyrrverandi forsetanum ger.

## Góðkendur

Nýggi italski ES-kommiserurin, Franco Frattini, slapp ígjøgnum nálareygað, tá hann var til avhoyringar í ES-tinginum fyrradagin, sjálvt um hann fek nógvar og ágangandi spurningar.

Italska stjórnin gjørdi av at velja Franco Frattini til ES-kommiser, eftir at ES-tingið sýtti fyri at góðkenna tað fyrra italska uppskotið, Rocco Buttiglione, tí hann tosaði niðurlátandi um kvinnur og samkynd. Fratini er í løtuni italskur uttanríkisráðharri.

Umframt Frattini hevur ES fngið tveir aðrar nýggjar kommiserar, og í morgin skal ES-tingið taka støðu til nýggju nevndina. Eygleiðarar siga, at hesaferð er eingin spenningur um atkvøðugreiðsluna, tí allir teir stóru tingbólkarnir hava boðað frá, at teir fara at atkvøða fyri nýggju nevndini hjá Jose Manuel Barroso.

## Dómadagur útsettur

Higartil hava vísindafolk hildið, at Jørðin fer at ganga undir um 11 milliardir ár, men nú siga tey seg vera komin eftir, at tann endaligi bresturin verður ikki fyrr enn um 24 milliardir ár.

Tað eru vísindafólk á lærda háskúlanum Stanford, sum eru komin til ta nýggju niðurstøðuna. Berlingske Tidende ivast kortini í, um vit skulu taka metingina í álvara, tí maðurin, sum hevur staðið fyri kanningunum, hevur fyrr sagt, at Jørðin fer at ganga undir um 11 miliardir ár.

Andrei Linde, kanningarleiðari, sigur, at tann nýggja metingin byggir á upplýsingar, sum eru fingnar til vega við tí stóra Hubble-kikaranum. Sambært hesum upplýsingunum er rúmdin framvegis í menning, og tí fer Jørðin ikki at ganga undir fyrr enn um 24 milliardir ár, sigur Andrei Linde nú.

# Bush hevði ikki álit á Powell



*Colin Powell var mangan ósamdur við Bush og heykunum í stjórnini*


*Condoleezza Rice hevur somu uppfatan av heiminum sum Bush, forseti*

**Colin Powell fór frá, tí George W. Bush og hansara næstu menn høvdu ikki fult álit á honum**

USA
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað kom ikki óvart á eygleiðarar, at Colin Powell valdi at siga seg úr amerikanska uttanríkisráðharrastarvinum. Tey fýra árini, hann hevur røkt starvið, hava verið eitt áhaldandi stríð við heykarnar í Bush-stjórnini, serliga varaforsetan Dick Cheney og verjumálaráðharran Donald Rumsfeld.

Eygleiðarar í Washington søgdu í gjár, at George W. Bush, forseti, hevur heldur ikki kent seg vísan í, at hann kundi hava fult álit á sínum uttanríkisráðharra. Powell segði kanska tað, sum forsetin hugsaði og ætlaði, men sjálvur hevði hann ofta heilt aðrar áskoðanir, siga eygleiðararnir. Tað er alment kent, at Powell vildi hava uppaftur fleiri lond at taka lut í krígnum við Irak, og at hann vildi hava nógv fleiri hermenn til álopið, men at hann noyddist at slaka fyri heykunum.

Í gjár varð roknað við, at Condoleezza Rice, trygdarráðgevi, fer at taka við eftir Powell. Sagt verður, at við henni fær Bush ein uttanríkisráðharra, ið hugsar sum forsetin, og sum eisini var við til at leggja álopið á Irak til rættis.

Summir eygleiðarar halda, at Condoleezza Rice hevur eina gamla utanríkispolitiska uppfatan, sum byggir á viðurskiftini undir kalda krígnum, og at hon hevur ikki tað tol, sum ein uttanríkisráðharri helst skal hava.

Colin Powell fer kortini ikki frá, fyrr enn Senatið hevur góðkent eftirmannin. Í næstu viku fer hann til Miðeysturs at tingast við ísraelskar og palestinskar leiðarar.

Colin Powell er tann sætti ráðharrin, sum hevur kunngjørt, at hann fer frá. Hinir eru løgmálaráðharrin John Aschroft, handilsmálaráðharrin Don Evans, orkumálaráðharrin Spencer Abraham, landbúnaðarmálaráðharrin Ann Veneman og kenslumálaráðharrin Rod Paige. Eygleiðarar bíða nú í spenningi eftir, um Donald Rumsfeld fer at koma við somu boðum. Hildið verður fyri vist, at hann fer frá, men spurningurin er, nær tað verður. Summi halda at hann verður sitandi, til tað ætlaða valið hevur verið í Irak í januar.

# Kanna krígsbrotsverk í Fallujah

**Sjónvarpsmyndir vísa, at ein amerikanskur hermaður skjeyt ein særdan, óvápnaðan iraka í einari mosku í Fallujah**

KRÍGSBROTSVERK
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*


*Myndirnar hjá NBC vísa, at ein hermaður siktar eftir tí særda irakanum. So hoyrist eitt skot*

Ein myndamaður hjá sjónvarpinum NBC var við nøkrum amerikonskum hermonum, tá teir tóku eina mosku í Fallujah. Á myndunum sæst, at fimm særdir irakar liggja á gólvinum í moskuni. Brádliga rópar ein av amerikonsku hermonnunum:

– Hann andar enn. Hasin lúshundurin letst vera deyður.

So sæst, at hermaðurin vendir byrsu síni ímóti høvdinum á tí særda irakanum, og eitt skot smellur.

Amerikanska verjumálaráðið Pentagon vildi ikki gera viðmerkingar til myndirnar í gjár, men herleiðslan í Irak kunngjørdi, at hon kannar, um amerikanskir hermenn hava gjørt seg sekar í krígsbrotsverki í Fallujah.



# Transformararnir skiftir


*30 tons verða lyft yvir á ein betongfót. Nýggi transformarin, sum varð settur upp á koblingsstøðini hjá SEV í Skálabotni í síðstu viku, kemur í staðin fyri gamla transformaran frá 60'unum*

*Mynd: SEV*

**SEV hevur sett upp ein nýggjan transformara í Skálabotni. Hetta er liður í einum umfatandi útskiftingararbeiði, har teir stóru transformararnir frá 60'unum verða skiftir út**

TRANSFORMATORSKIFTI
*tíðindaskriv*

Í síðstu viku varð ein nýggjur transformari settur upp á koblingsstøðini hjá SEV í Skálabotni. Talan er um ein 10 MVA 60/20 kV transformara, sum kemur í staðin fyri tann gamla 60 kV transformaran, ið varð settur upp í Skálabotni miðskeiðis í sekstiárunum.

Nýggi transformarin í Skálabotni er liður í einum útskiftingararbeiði, har gomlu transformararnir frá 60'unum verða skiftir út. Í fjør varð ein líknandi transformari skiftur út í Havn, og ætlanin er at skifta tveir transformarar út í Vestmanna komandi tvey árini.

Nýggju transformararnir viga 30 tons, og teir eru framleiddir hjá SGB í Týsklandi. Tað kostar tilsamans 6,5 milliónir krónur at skifta teir fýra transformararnar út.

Transformararnir broyta spenningin úr 60 kV, 60.000 volt, niður í 20 kV, 20.000 volt, haðani spenningurin aftur umvegis smærri transformarar verður broyttur niður í 400-230 volt til húsarhaldini.

# Kvøldseta á Kambsdali

TÍÐINDASKRIV

Hóskvøldið 18. november kl. 19.30 verður kvøldseta í Studentaskúlanum á Kambsdali. Á skúlanum er kvøldseta hvørt hálvár, og hóskvøldið verður fyrra kvøldsetan í hesum skúlaárinum.

Skráin plagar at vera eyðkend av nógvum sangi og tónleiki, og soleiðis verður tað eisini hesa ferð. Hástigsholdini í 2. og 3. s fara at syngja og spæla, tvørfloytur fara at ljóma, og næmingar í 1. s fara eisini á pallin. Viðhvørt hava lærararnir tikið seg saman og spælt og sungið. Tað er ikki ómøguligt, at teir eisini hesa ferð fara at spíla seg út.

Næmingar í 3. a vóru fyri heystfrítíðina í Prag. Hóskvøldið fara teir í myndum og orðum at greiða frá, hvat teir fingu burturúr vitjanini í hesum gamla mentunarmiðdeplinum í Europa, sum síðani jarntjaldið fall aftur er vorðin ein av mest vitjaðu europeisku býunum.

Hesar seinastu ferðirnar hava næmingar greitt frá onkrum frítíðarítrivi, sum teir hava. Hesa ferð er tað Ólavur Mørkøre, sum gongur í 3. x, sum fer at greiða frá. Ólavur er ættaður av Eiði. Í ljósu tíðini vísir hann viðhvørt fólki vegin niðan á Slættaratind. Hvussu tað gongur fyri seg, hvat tey vitjandi eru áhugað í, og hvat tey spyrja um, fer Ólavur at siga eitt sindur um.

Í tveimum øðrum innsløgum verður Slættaratindur eisini evnið. Rektarin í Studentaskúlanum, Sámal í Skorini, fer at siga nøkur orð um hægsta fjallið í Føroyum. Eitt nú hvussu ognarviðurskiftini eru, og hvussu seyðahaldið er har á leið. Tað er upplagt, at rektarin fer at hugleiða um hetta, tí hann er annar av tveimum røktingarmonnum á Slættaratindi.

Hitt innslagið um Slættaratind hevur við skaldskap at gera. Næmingar fara at bera okkurt fram av tí, sum Slættaratindur hevur verið íblástur til hjá teimum, sum hava yrkt og skrivað.

Sum vanligt á kvøldsetunum á Kambsdali, so verður eisini hesa ferð skipað fyri kafe. Tað er 1. y, sum bjóðar okkurt leskiligt. Tað gera tey í sambandi við, at flokkurin er farin undir fyrireikingar til ferðina uttanlands, sum ætlanin er, at tey skulu fara á heysti í 2006.

Kvøldsetan verður hóskvøldið 18. november kl. 19.30 stundisliga. Tað er ókeypis atgongd, og øll eru væl komin at síggja og hoyra okkurt av tí, sum tey fáast við í Studentaskúlanum á Kambsdali.

